Viðmerkingar

Liberalisma ver vælkomin

Øll tosa um hann, men eingin ger nakað við hann – almenni sektorurin

Kjakið seinastu árini hevur leysliga snúð seg um løysing ella samband, men í heyst byrjaði kjakið av alvara aftur um veruligan høgra/vinstra politikk.

Teir blindu flokkarnir

Caragata er sera væl gjørt arbeiði, og síðani gjøgnumtannlað. Hóast álitið er væl úr hondum greitt, hevur tað eisini sínar veiku síður.

Álitið er gjørt sum ein avleiðing av, at rikisveitingarnar framyvir skulu minka, men tað tyngjandi í øllum hesum er, at løysingin er høvuðsendamálið eins og við øllum øðrum, sum landsstýrið nertir við – syrgiligt!

Velja vit løysingina, fær hetta avleiðingar. Vit hava heldur ikki sæð annað enn ávaringarklokkur, tá vit tosa um avleiðingar av løysingini.

Hvørji eru tey, sum hava nevnt orðið avleiðingar:

Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin, allir danskir flokkar (fra vinstru til høgru), Hvitabók, Caragata, og er Folkaflokkurin nú eisini farin at skilja ávaringarnar.

Teir blindu eru Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, og vilja teir framvegis ikki siggja veruleikan í eygunum.

Caragata í rikisfelagsskapinum

Kjakið snýr seg í lotuni um, hvussu byrgast skal fyri, at avleiðingarnar ikki bliva ov álvarsligar fyri fólk og buskap.

Ráðgevarar úr fjarskotnum londum vóru settir at gera eitt álit, ið staðfestir nøkur evni um stoðuna ta, nú og hvussu vit framyvir skulu takla nakrar ræðuligar avleiðingar av eini løysing.

Nógv áhugavert er í Caragata t.d. staðfestir álitið á síðu. 33: «Høvuðstrupulleikin var, at tátiðar politikkarar og embætismenn ikki dugdu at stýra og umsita, og at teir onga ábyrgdarkenslu høvdu». Tí spyrji eg sum sambandsmaður, hvi skulu vit loysa, tá trupulleikin vóru vit sjálvi?

Caragata-álitið kann nýtast, sjálvt um endamálið við tí er nakað annað. Um loysing ikki stóð fyri framman, hevði Caragata verið enn meira bjart og gagnligt fyri allar rikisborgarar sum heild.

Onkur partur av álitinum er áhugaverdur, sjálvt um vit eru í rikisfelagsskapinum.

Blokkurin er ikki ein rikisfelagsskapur, og hann skal, um vit vilja tað ella ei, niður-justerast. Tí eru brot úr Caragata kanska eitt alternativ til blokkin.

Seljið til hægstbjóðandi og sparið

Landið kann selja Føroya Banka, fiskavirkini, Faroe Seafood Prime og Atlantic Airways.

Um hægstbjóðandi er føroyingur ella útlendingur, er líkamikið. Tá mugu kenslur verða kenslur. Viðkomandi, sum keypur, hevur bert eitt í huganum, nevniliga profitt, og ikki at kuga ella trælka føroyingin. Føroyingar eru viðskiftafólk ella arbeiðsmegin í hesum fyritøkum, og tí er tað als eingin ræðumynd, um sølan verður fullførd.

Arbeiðsmegin vil altíð verða tað berandi í eini fyritøku, og hon verður óivað føroysk nógv ár afturat.

Fylgja vit partar av álitinum, verða vit uttan iva rikari. Kanska kemur veruligt kapping a flogsambandið! Kenslurnar fyri hesum fyritøkum mugu vit veittra farvæl til. Tað er ongantíð ov seint at selja okkara almenna banka o.s.fr.

Potentiellir keyparar vita, at Føroyar eru turbulentar, og tí kann prisurin óivað gerast lægri, enn vit rokna við og sjálvi hava spatt. Tí mugu vit verða realistisk og seta okkum sjálvum spurningin: «Vildi eg keypt bankan, og hvussu nógv vil eg keypa hann fyri??».

Tað er sjálvandi ynskiligt, at vit fáa rimuligt afturfyri ein slíka sølu.

Sparsemi innan skúlaverkið

Vit tosa øll um tað, men eingin ger nakað við tað. Latið okkum spara innan skúlaverkið.

Eingin politikkari torir at siga farvæl til potentiellar veljarar, men einaferð skal tað gerast, og lat tað verða nú.

Nógvar milliónir krónur kundu verið spardar, um vit hækkaðu upptøku-krovini til lestrarligu miðnámsskularnar (handils- og studentaskularnar og Læraraskulan).

Landið hevði spart hopin av lærarum, og tað hevði verið ollum at gagni – næstan!

«Jamen, tað er so synd fyri næmingarnar, ið hava torført við at læra!», sigur onkur. Tvørtur imoti! Allir møguleikar eru ikki í Høvdølum og á Kambsdali. Vit hava nog mikið av utbugningum til teir næmingar, ið ikki eru sterkir til lesnað – allar utbugvingar í rikisfelagsskapinum.

Hetta kann bert verða ein fyrimunur fyri næmingin, ið ikki er sterkastur í ti bokliga. Tiskil hjálpir ein strangari skipan tí veikasta at velja rætt og ikki skeivt, sum tíverri er fakta í dag.

Hvør nýtir tær sokallaðu «lopfjøls-útbugvingarnar» til fulnar t.v.s. til viðari lesna? Øll nýta tær, men bert teir bestu sleppa viðari til hægri lesnað. Sum nú er, verða hesar útbúgvingar misnýttar til fulnar.

Um tú ikki veitst, hvat tú vilt aftana 9. ella 10 flokk, so er ein skraseting á handilsskulan ella studentaskulan lættasta løysnin, men hetta er tann dýrasta fyri landið. Sjálvandi er alt hetta eitt vandamikið stað at spara á. Tað eru onvað onnur stað, ið politikkarin heldur vil nema við enn just hettar. Tað standa rætt og slætt ov nógvar atkvøður uppa spæl hjá politikkarunum, og tí verður einki gjørt við hetta øki.

Lærarar hava einki imóti einari næmingatilgongd, ið er maksimal. Tess fleiri næmingar teir hava, tess tryggari arbeiði.

Michael Jensen
sambandsmaður

Oljuhavn og floghavn

Nú vit eru á veg inn í eina nýggja øld, og inn í eitt nýtt ártusund, standa stórar avbjóðingar fyri framman.

Løgtingið hevur júst havt fyrstu viðgerð av uppskotið til løgtingslog, sum skal geva oljufeløgum loyvi til at bjóða uppa- og fara undir at leita eftir kolvetnum í føroyskum øki.

Í viðmerkingunum til uppskotið, sigur Eyðun Eltør, landsstyrismaður í oljumálum, at vinnan sjálv skal gera av, hvar møguligar oljuhavnir skulu vera. Tó leggur hann afturat, at landsstýrið ætlar at hava eftirlit við gongdini, so sleppast kann undan ovurstorum íløgum.

Tað er í tráð við politikk Sambandsflokksins, at vinnan sjálv skal gera av, hvussu hon skipar sítt virksemi. Men í landsstýrissamgongduni hava longu røddir verið frammi, sum beinleiðis hava sagt, at ein olju- og utgerðarhavn liggur best í Suðuroynni.

Við Sosialin tann 25. november í ár, sigur formaður Tjóðveldisflokksins, Heini O. Heinesen, at stoðan í Suðuroynni nú er so vánalig, at skal hon framhaldandi vera ein livandi partur av Føroyum, ma ein komandi oljuvinna verða savnað har.

Ein kann spyrja, hvønn politikk, samgongan ætlar at reka á hesum øki, tá landsstýrismaðurin sigur eitt, meðan formaðurin fyri størsta samgonguflokkin sigur nakað annað.

Tað kundi eisini verið áhugavert at fingið at vita, hvat oljufeløgini siga til, at teirra størsta uppgava í Føroyum, verður at halda liv í einum lokalum øki.

Føroyskur kajkantur og føroysk floghavn

Í viðmerkingunum hjá landsstyrismanninum verður eisini sagt, at øll útgerð sum kann, skal um føroyskan kajkant, og allur folkaflutningur skal um føroyska floghavn.

Hvat siga oljufeløgini til slíkar treytir? Ein umboðsmaður fyri hesi felog hevur longu sagt alment, at verandi floghavn í Føroyum, er ikki nog góð, ta talan er um oljuvinnu. Eisini hava røddir verið frammi sum hava sagt, at tað ikki verður góðkent, at ein og sami flogvøllur verður nýttur til bæði oljuvinnu og ferðaflutningin.

Tað hevur alstóran tvíning, at vit hava ein hoskiligan kajkant, og einaferð nýtiliga floghavn, um treytin fyri at leita eftir olju er, at fólk og útgerð skulu tann vegin. Vit kunnu ikki seta treytir, sum vit sjálvi ikki klára at halda.

Men í viðmerkingunum verður eisini sagt, at nevndugt verður við storum útbyggingum, um olja ella gass verða funnin. — Er talan her kanska um nýggja floghavn á Glyvursnesi?

Um oljuvinnan verður savnað í Suðuroy, sum nakrir politikarar ætla, so er floghavnin á Glyvursnesi ein nátturligur partur av heildini. Tað er í miðstaðarøkinum, at flestu tænastuveitingarnar eru, og tí gevur tað onga meining at kunna flúgva úr Suðuroynni og vestur í Vágar, fyri síðani at koyra í bili aftur til Havnar eftir tænastuveitingum. Tá er bæði skjótari og hóttari at sigla.

Um floghavn verður bygd á Glyvursnesi, er møguleiki fyri at nýta hana til oljuvinnuna í fyrstu syftu, og síðani til ferðaflokaflutning, tá oljuvinnutrýstið einaferð er hóast.

Hvat sigur vinnan?

Hesa seinastu tíðina hevur kjak tikið seg upp, um hvar í landinum, ein oljuhavn skal vera. Nakrir politikarar hava longu bjóðs seg fram, til at arbeiða fyri at ein oljuvinnuvirksemi savnað í Suðuroynni. Um tað eitt løgtaruppskot verður samtikt, sum sigur, at oljuhavnir bert mugu vera í Suðuroy, og lat okkum siga, at 10 risafelog koma at leita eftir olju, verður so pláss fyri øllum har? Og hvat hendir, um pláss ikki verður fyri øllum, og løgtingið hevur samtykt, at felogini ikki mugu koma norður um Suðuroyarfjørð?

Ein annar áhugaverdur spurningur er eisini, hvat hendir, um løgtingið fellir uppskotið, um at leggja oljuvinnuna í Suðuroy? Er Suðuroygin so, fyri allar tíðir, útilokað frá oljuvinnuni?

Tað einasta rætta í hesum samanhangi er at vit í løtingarfelsinum vísa oljufeløgunum á hvørjar møguleikar sum vit hava. Síðani kunna vit, um olja verður funnin, saman við oljufeløgunum velja best egnaðu havnirnar (tað kundi tíl dømis verið Suðuroy, Sund og Skálafjørður).

Fá arbeiðspláss

Tá talan hevur verið um, at oljuhavnirnar í leitingarfasuni skulu bjarga allari Suðuroynni, so trúgvi eg ikki, at hetta verður so. Einastu arbeiðsplássini, ið hetta fer at skapa, eru nakrir fáir arbeiðstimar, við lossiarbeiði.

Sambandsflokkurin hevur í skrivi til Suðuroyar Oljuvinnuráð boðað frá, at flokkurin einki hevur imóti, at Suðuroyggin fær oljuhavnirnar, um feløgini ynskja at verða har. Men flokkurin heldur tað ikki vera rætt, at føroyskir politikarar longu nú skulu taka avgerðir hesum viðvíkjandi.

Føroyingar skulu vera við

Vit mugu ikki spæla kortini so illa út, at vit als ikki fáa lut í eini møguligari oljuvinnu á føroyskum øki. Tí hevði verið rættast um landsoljufelag varð sett á stovn, eins og gjørt varð í Noreg, tá oljuvinnan har byrjaði. Á tann hátt kundu vit tryggja okkum møguleikan, fyri luttøku í oljuvinnuni – um ikki nú, so seinni.

Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Kraftblokkabátarnir kroystir

Tøl frá Føroya Hagstovu fyri fiskiskapin undir Føroyum fyrstu 10 mánaðirnar í ár vísa, at virðið av tí, sum er veitt undir Føroyum í ár, er umleið 55 mio. kr. minni enn í 1998. Ein afturgongd frá 808 mio. kr. til 753 mio. kr. svarandi til 7%.

Vit vita øll, at seinastu árini hava verið avbera góð til fiskiskap, og prisirnir hava fyri nærum øll fiskasløg verið uppgangandi í sama tíðarskeiði, so tað liggur neyvan nakað dramatiskt í eini afturgongd av hesi stødd.

Men hetta er bert fyri heimaflotan. Teir, sum fiska undir Føroyum. Men hvat við hinum flotanum, fjarfiskaflotanum.

Eg skal triva í nøkur tøl fyri kraftblokkaflotan og vísa á, at her er øørvisi dramatikkur í luftini. Hesin flotin hevði 2 hampulig ár í 1996 og 1997 og eitt gott ár í 1998, men nú er vend komin í, so tað fellur. Kraftblokkaskipini eru 8 í tali. Tey royna eftir síld, makreli, hestamakreli, loddnu og svartkjaftí við nót ella troli. Í metarinum 1998 veiddu hesi skip tilsamans fyri 275 mio. kr. ella fyri uml. 34 mio. kr. í meðal upp á skipið.

Nú, vit nærkast endanum á 1999, hava hesi somu skip fiskað fyri uml. 152 mio. kr. ella 19 mio. kr. í meðal upp á skipið. Ein afturgongd upp á 123 mio. kr. talt ella 45%.

Tað hevur í seinastuni verið nógv frammi um okkara nýggjaru skip. Tey skulu í minsta lagi fiska fyri 35 mio. kr fyri at svara hvørjum sitt og allar helst nakað meira nú, tí mestsum alt gongur tann skeiva vegin. Svartkjaftafiskiskapurin var ovanliga góður í 1998 og er í minking. Oljuprisirnir eru farnir upp í meira enn tað dupulta seinasta árið. Hetta merkir uml. 3 mio. kr. meira í útreiðslum fyri ein kraftblokkabát. Hartil er rentan farin upp.

Meðalprisirnir fyri allar nøgdir tilsamans eru falnir við 33%, men virðini eru sum sagt fallin við 45%. Altso er ein afturgongd í nøgdunum eisini.

Men sum sagt er meðalfiskiskapurin fyri 1999 19 mio. kr. upp á skipið, har fleiri skulu hava 35 mió. kr. ella meira. Onkur má hjálpast við lítið, um hetta skal hanga saman. Og tað ger tað ikki. Tað vera nógv reyð tøl at sigga í roknskapinum hjá pelagiska flotanum 1999.

Tað eru tvey álvarslig aspekt í hesi gongdini.

Annað er tað samfelagsbuskaparliga. Her er ein afturgongd upp á 123 mio. kr. Tað fer at merkjast ookustaðni – mest í teimum kommunukassunum, sum fáa storar inntøkur frá kraftblokkabátunum.

Hin er tann, at pelagiska kvotan tykist at skula lyftast út til alsamt fleiri. Og ta ið galdast skal fyri kvotur í sinamillum samarbeiðnum við okkara grannatjóðir, so tykist tað fyri tað mesta at vera við pelagiskum fiski. Hetta máar burtur av tilverugrundarlagnum hjá hesum partinum av flotanum og sum sagt eru útlitini longu nú álvarslig.

Við hetta lag verður trupult at gera ætlanir. Sum er, rokna vit við, at okkara kvotur uttan svartkjaft, hava eitt virði upp á 15-20 mió. kr., so tað skulu koma fyri 15-20 mio. kr. burtur úr svartkjaftinum fyri, at tað skal hanga saman.

Vit vænta, at kvotur verða settar á svartkjaft innan fyri 2-3 ár og við teimum tiltum, vit í dag hava, kunna vit rokna við í mesta lagi at fáa 10.000 – 15.000 tons upp á skipið um árið. Um prisurin er 60 eyru, so gevur hetta 6-9 mio. kr. afturat teimum 15-20 mio. kr. fyri hinar kvoturnar.

Sum tað sær út í dag liggur inntøkugrundarlagið hjá einum kraftblokkabáti altso undir 30 mió. kr. um árið fyri eitt gott ár. Og teir nýggju skulu sum sagt hava 35 mió. kr. ella meira. Her verður galin endi.

Fyrr í heyst varð nógv tosað um endurnýggjan av skipaflotanum. Tá varð mestsum bert hugt eftir flotanum undir Føroyum. Eingin tok kraftblokkabátarnar upp á tungurna ella hinar – fjarfiskabátarnar fyri tann skuld. Ei dámi tí, tí her er einki grundarlag fyri endurnýggjan. Ílegustødd og inntøkumøguleikar hanga ikki saman longur.

Fiskivinnumyndugleikar nir mugu taka hendu vera- ikki í minsta alvara, tí fylgjurnar av ov lítlum inntøkugrundarlagi vísa seg skjótt. Sjálvt um nøkur hampulig ár hava verið, so er lítið av eginpeningi akkumuleraður í felagunum. Skipini voru illa fyri, aðrenn hesi trý seinastu árini, so holini voru eisini nógv at koyra í. Vantandi viðlikahald, gamal og utslitin reiðskapur og útskifting av tólum fór við tí mesta av avlopinum. So tey flestu av felagunum eru framvegis ógvuliga viðbrekin og tola bert lítla afturgongd, fyrrenn tað stendur á aftur.

Úttitini fyri 2000 tykjast ikki at hava storar broytingar við sær. Prisirnir eru komnir nakað uppaftur, so vónandi verður økkurt at royna eftir, men tað verður tungt at fáa endarnar at røkka saman, um eingi broytist.

Gøtu 8.12.1999
Atli Hansen

En generation uden værdier

Vor socialminister, Karen Jespersen, melder nu ud med følgende udtalelse: »Børn vokser op uden at vide, hvilke værdier i livet, deres forældre lægger vægt på«, og hun ønsker nu en debat herom

Denne udmelding fortjener at blive fulgt op. Thi hvilke åndelige værdier har mon forældregenerationen – at tilbyde deres børn? Spørgsmålet er nærmest pinligt og derfor nok tabuemne, men burde ej være det. Thi »something is rotten in the state of Denmark«, når man bl.a. i Berlingske Tidende d. 2/12 kunne læse om Frederiksund Kommunes børne- og ungdomsslage, Vibeke Manniches undersøgelse af 9. klassers godnatvaner. De unge går ikke til ro om aftenen med noget så ligegyldigt som en god bog, nej det er de flimrende TV-billeder af mere eller indre hård porno, det drejer sig. Med denne afsporede nysgerrighed efter sex risikerer de unge at få et forkvalket sexliv som voksne, mener børnelægen, ligesom de i høj grad kan få en forstyrret opfattelse af kvinden.

De unge har så at sige alle som obligatorisk værelsesudstyr TV/video, som kører til langt ud på natten, hvad der i sig selv er bekymrende, men det mest bekymrende, mener Vibeke Manniche, er den almindelige dyrkelse af porno, som hun er overbevist om må få konsekvenser på sigt. Flere af hendes kolleger deler hendes bekymring. Og det med rette. Men lægerne vil – som de selv siger – helst ikke fremstå som »moralens vogtere«, men på den anden side må jo nogle råbe vagt i gevær, når den kristne kirke, som teoretisk taler, mod synden og dens følger, i praksis er så underligt bovlam og uden forbindelse med virkelighedens, især børnenes og de unges. Og uden selv at være solgt på evangeliet og dets kraft.

Og så har vi nu socialministeren med oplysningen om børnenes uvidenhed om deres forældres livsværdier. Har de nogen? Noget tyder på, at dette ikke er tilfældet generelt. I hvert fald ikke i en sådan grad, at de bryder sig om at formidle dem til børnene og de unge. På lige det punkt er ligegyldigheden eller afmagten stor. Og hvem har forresten ansvaret for den sindssyge pornografiske underholdning i TV? Det er ikke børnene, men voksne, afstumpede producerede uden noget egentligt livsindhold, og som til selv har børn, som deres rådden-skab skal overlades til i tide og utide. Og altså også ved sengetid.

Men det er ikke bare producere med sex på hjernen, som har ansvaret. Det er den forældregeneration, som ansvarsløst og passivt lader det stå til og som døde fisk svømmer med strømmen og desværre tager deres børn med i afgrunden akkompagneret af beskidte TV-udsendelser og den rå latter. Ak, jeg er bange for, vi er kommet så vidt, at ordene i Jer. 5:31 også kan siges om mit dyrebare fædreland: »Mit folk elsker det sådan!«. Men enden på det hele vil blive som i det gamle, usædelige romerrige: undergang. Gud lader sig ikke spotte. Eller som børnelægen sagde: Det må få konsekvenser.

Er der noget alternativ? Nogen redning? Ja, den findes ikke i en forblommet

debat om »samfundsværdier«, som socialministeren velmenende lægger op til, men i at give børnene det guddommelige »input«, som hedder livets ord i de gamle, evigt gode nyheder om Han, vor Herre Jesus Kristus, der kom til verden for at frelse syndere, inkl. de mest håbløse, hvor de end findes i de stakkels ødelagte, vesterlandske hjem med fortabte børn og deres forældre. Ja, sådan lød jo ordene, da det allerførste gang blev jul for ca. 2000 år siden: »Du skal give Ham navnet JESUS, thi Han skal frelse sit folk fra dets synder!« (Matt. 1:21).

Jørn Nielsen,
Næstved

Stutt viðmerking til grein hjá Eyðuni Viderø um »Trupulleikan hjá útjaðaranum«

Fyrst mugu vit slaa fast, at metingar sum Páll Vang hevur um farleiðina Suður-oy-Meginøkið, tær verða undirritaði sjálvur at koma við.

Tað sigst at suðringar fáa umboð í samferðslunevndina, og har fara vit at gera ávisar kanningar um best hóskandi ferðasamband fyri suðringar. Ikki meira um hetta á hesum sinni.

Í øðrum lagi er nógv tos um útjaðaran. Tos eru vit troytt av. Nú krevst, at menn í verki visa tað, teir siga seg vilja fremja.

Tað vóru annars fleiri, ið tosa, sum tagdu, tá kjakið um eina oljuútgerðarstøð var til viðgerðar.

Tað eru fleiri enn bert undirritaði, ið fylgja við í spenningi.

Um sakligar viðmerkingar um mun á útjaðara- og miðøkið verða tulkaðar sum grenj – ja, so kemur meira grenj.

Annars eru bert triggjar vikur til ferðaseðlaprísurin út í Faglovnna hækkar.

Við heilsan
Páll Vang

Brøv til Dimmalætting

Aldan norðanfyri

Havi verið uttanlands í eina tíð, og hóast umheimurin bjóðar uppá nógvar sorgarleikir, so var tað við góðum treysti og gleði, at eg kom aftur til Føroya, eitt yndisligt land.

Men gakk. Longu í bussinum frá flogvøllinum kom eg í døpurhuga.

Úr einum lurtitoli, ið bussførarin hevði sett til (eg veit ikki hvi), hoyrdu vit um alduna norðanfyri, eystanfyri, sunnanfyri og vestanfyri. Um Íslandsryggin. Fuglayarbanka, Føroyabanka, Biscayavikina, Ermasundan og Norðsjógvin. Um hátrýst og lágtrýst, fra hektopascal til millimetrar. Úr ein landnyrðing til ein útsynning. Frá metrum um sekundið til metrar og sentimetrar høgar.

Tá ið hann í døguðratimanum, dagin eftir mína heimkomu, fór úr ein grið upp ein skrið til storm, mesta og matarivrestin. Luftitoliø endurtók hetta uppi saman og hvør sær klokkan 12.00, kl. 12.20, kl. 12.40 og kl. 13.00. Eg hoyrdi tað í gjárkvøldið, og eg hoyrdi tað í morgun. Eg hevi hoyrt tað ferrapartin og seinnapartin og tað kemur aftur eftir náttarrógv og um somgartíð.

Um hetta er ein ídylla hjá fásuni skulu bjarga allari Suðuroynni, so trúgvi eg ikki, at hetta verður so. Einastu arbeiðsplássini, ið hetta fer at skapa, eru nakrir fáir arbeiðstimar, við lossiarbeiði.

Sambandsflokkurin hevur í skrivi til Suðuroyar Oljuvinnuráð boðað frá, at flokkurin einki hevur imóti, at Suðuroyggin fær oljuhavnirnar, um feløgini ynskja at verða har. Men flokkurin heldur tað ikki vera rætt, at føroyskir politikarar longu nú skulu taka avgerðir hesum viðvíkjandi.

Føroyingar skulu vera við

Vit mugu ikki spæla kortini so illa út, at vit als ikki fáa lut í eini møguligari oljuvinnu á føroyskum øki. Tí hevði verið rættast um landsoljufelag varð sett á stovn, eins og gjørt varð í Noreg, tá oljuvinnan har byrjaði. Á tann hátt kundu vit tryggja okkum møguleikan, fyri luttøku í oljuvinnuni – um ikki nú, so seinni.

Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Utvarpinum ella fyri at halda skapsmanningarnar inni í lugarinum og stýrishusinum er ivasamt, men dapurt er tað. Tað gevur tunglyndi og atti tí at verið sent frá eini rás fyri seg, t.d. í sambandi við eina føroyska veðurtænastu.

Vónandi verða tær komandi utvarpsrásirnar ikki so «veðursjúkar».

Lurtari